# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

**Føðingar**

15. juli fingu Kamille Rosenfalck og Gunnleif Blaasvær, Ålborg, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3740 gr.

16. juli fingu Lydia Ísaksdóttir, Sørvágur og Oddni Strøm, Tórshavn, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3050 gr.

17. juli fingu Rakul Thorsteinsson og Jónleif á Svínafløtti, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 49 cm. lon gog vigaði 2850 gr.

18. juli fingu Gunn Danielsen og Fritleif í Lambanum, Ljósá, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3700 gr.

18. juli fingu Anita og Sigmund Sørensen, Hoyvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3800 gr.

18. juli fingu Jóna Petersen og Jan Berg, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4100 gr.

Sunnudagin 20. juli var ein gleðis dagur fyri Carine de Conseisaue de Jesus úr Brazil og Heðin Kyrjarheyg úr Klaksvík, tá tey fingu ein lítla fríska dóttur. Hon var borin í heim í Rio de Janeiro, og vigaði 3500 gr.

20. juli fingu Sigurgunn og Thomas Kjelnæs, Rituvík, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4000 gr.

21. juli fingu Aslaug og Arnbjørg í Smiðjuni, Fámjin, tvíburar - gentu og drong. Gentan var 46 cm. long og vigaði 1810 og drongurin var 49 cm. langur og vigaði 2855 gr.

21. juli fingu Valborg Klæmintsdóttir, Norðragøta og Jóhannes S. Johannesen, Trongisvágur, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3400 gr.

22. juli fingu Turið Müller og Arngrímur Arngrímsson, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3300 gr.

22. juli fingu Ann og Hans Anders Jacobsen, Nes, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3050 gr.

23. juli fingu Súsanna og Ólavur Gaard, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3350 gr.

23. juli fingu Sólgerð á Kinn og Finnbjørn Vang, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3400 gr.

23. juli fingu Annelis í Homrum og Jørgin Joensen, Svínáir, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3300 gr.

23. juli fingu Birgit og Eyðun Djurholm, Hósvík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3820 gr.

**Brúdleyp**

Leygardagin 26. juli kl. 16.00 giftast í Hoyvíkar Kirkju Guðrun Vang og Jón Højsted. Opið hús er heima frá kl. 21.

Leygardagin 26. juli giftast Bjørg Hanusson og Rúnálvur Poulsen, bæði úr Tórshavn. Opið hús verður í Fjalsgøtu 17, frá kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 26. juli giftast Ingi Zachariassen og Raidun Andreasen úr Streymnesi. Vígslan verður í Tjørnuvíkar kirkju kl. 14 og veitsla fyri innbodnum í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 18.

Leygardagin 26. juli kl. 13 giftast í Kvívíkar kirkju Petra Elisabeth Hansen úr Kollafirði og Morten Hust Petersen úr Middelfart. Brúdleypið verður hildið á Hotel Føroyum fyri innbodnum.

Leygardagin 26. juli kl. 14.00 giftast í Tvøroyrar kirkju (og ikki sum áður lýst í Hvalbiar kirkju) Jenny Niclasen og Magnar Næs.

Leygardagin 26. juli kl. 16.00 giftast í Havnar Kirkju Leila Arge, Tórshavn, búsitandi Reykjavík og Svein Síminarson, Reykjavík. Døgurðin verður hildin í Grønlendska húsinum kl. 19.00 fyri innbodnum.

Leygardagin 26. juli giftast í Dals kirkju, Kjarta Johannesen, Dalur, og Erland E. Jacobsen, Argir. Veitsla verður fyri innbodnum í Eiriksgarði í Dali kl. 19.00.

Fríggjadagin 1. august giftast í Gøtu kirkju Eyðrit Gøthe, Norðragøta og Jacob Martin Jacobsen, Skálafirði. Vígslan verður kl. 12.00, aftaná verður móttøka í kirkjukjallaranum til kl. 16.00.

Fríggjadagin 1. august kl. 14.00 giftast í Kirkjubøar kirkju, Anna í Gar›i Patursson, Kirkjubøur og Jógvan Heinesen, Nor›ragøta. Brúdleyp ver›ur fyri innbo›in á Hotel Føroyum kl. 19.00

**Silvurbrúdleyp og rundir føðingardagar**

Leygardagin 26. juli hava Meiken og Hanus Lamhauge silvurbrúdleyp og rundar føðingardagar. Tey, ið ynskja at gleðast saman við teimum á hesum hátíðardøgum, eru vælkomin í Eldrafelagið Nón, Torvgøta 2, Saltangará, har opið hús verður við morgundrekka, frá kl. 10 - 14. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**70 ára føðingardagur**

Mánadagin 28. juli verður Hanna Vatnsdal av Sandi 70 ár. Dagurin verður hildin í Jørundargøtu 40 í Hoyvík. Tey, sum vilja heilsa uppá Hannu, eru vælkomin millum kl. 10.00 og 16.00 til brunch.

**75 ár**

Sunnudagin 27. juli verður Osla Jacobsen, Sandavágur, 75 ár. Dagurin verður hildin hjá dóttrini á Merkrunum 2 frá kl. 18.00.

**Prógv**

2. juli fekk Óli Jógvansson Poulsen, Klaksvik, prógv sum logistikatstøðingur. Hann hevur lært hjá Tórshavnar Skipasmiðju.



Leygardagin 26. juli giftast Elisabeth M. Johannesen og Hans Magni Danielsen, Norðskála. Vígslan verður í Sands Kirkju kl 14.00 og veitslan er fyri innbodnum, í Eydnuni á Oyrarbakka kl 19.00



Leygardagin 26. juli kl. 13.00 giftast í Ebenezer Jóhanna Maria Mørkøre úr Tórshavn og Arnhold Olsen úr Klaksvík. Eftir vígsluna verður móttøka har øll eru hjartaliga vælkomin. Veitslan verður fyri innbodnum í Oasuni kl 18.00.



Leygardagin 26. juli kl. 15.00 giftast Hallgerð Brim, Klaksvík, og Ovi Magnussen, Toftir, í Christianskirkjuni í Klaksvík. Veitslan verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði kl. 19.00 fyri innbodnum.



15. juli fekk Ruth Nolsøe Reinert prógv sum Bachelor í Advertising and Marketing Communications á De Montfort University í Leicester, Onglandi.



Kirstin Hansen hevur tann 27. juni 2008 lokið prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur á Sygeplejerskeuddannelsen København.

---

✝

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at

**Anna Brattaberg**
fødd Wenningsted Tórgarð
vanliga nevnd Diste,
í Vági

andaðist hósmorgunin 24. juli á Tvøroyrar Sjúkhúsi 89 ára gomul.
Kistan fer úr Kapellinum leygarkvøldið kl. 18.30.
Jarðarferðin verður úr Vágs Kirkju sunnudagin 27. juli kl. 13.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Børnini**

Tey, sum ynskja at minnast Diste, kunnu lata eina gávu til Heilafelagið, konta í peningastovnunum.

---

✝

Okkara kæra mamma, omma, langomma og olduromma

**Margretha Egholm**

andaðist hósdagin á Lágargarði, 105 ára gomul.

Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

*Familjunnar vegna*

**Jens Petur, Petur og Hanna**

---

# Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Lillian Vang**
Tórshavn

doyði og varð jarðað.

*Familjunnar vegna*
**Hervør og Maria**

---

# Tøkk

Hjartaliga takki eg tykkum mongu, sum á ymiskan hátt gjørdu mær 80 ára føðingardagin so hugnaligan.

**Palli Dalsgaard**